











# Góð sethús á Glyvrum

Húsini eru sera væl hildin bæði innan og uttan og standa væl fyri á Dalavegnum á Glyvrum. Tað tekur bert 2-3 minuttir til gongu til barnaskúlan og til matvøruhandil og aðrar hentleikar.

Grundøkið er stórt, 1.363 fermetrar. Rundan um húsini er ein framúr vakur urtagarður við fleiri vøkrum blómum, trøum og hugnaligum krókum og einari stórari græsplenu. Her eru nógvir møguleikar hjá teimum, sum hava hug at fáast við urtagarð v.m.

Omanfyri húsini eru sera góðir atkomumøguleikar. Her er eisini stoyptur ein plattur til bilin og sostatt er gjørt klárt til at gera eitt bilhús.

Sethúsini eru í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er durur, gongd, vesi við brúsu, baðirúm, goymslurúm, køkur, stova og fýra kømur. Køkurin er hvítur og sjálvt rúmið er ljóst og stórt við góðum plássið til spísikrók. Frá goymslurúminum er ein trappa niður í kjallaran. Í niðaru hæddini er ein hárfríðkanarstova, durur , vesi og eitt gott og stórt kjallararúm, sum er vælegnað sum arbeiðsrúm ella til goymslu.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 357400.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 1980 |
| Hæddir: | 2 |
| Stødd innan: | 352 m2 |
| Grundøkið: | 1363 m2 |
| Prísuppskot: | kr. 2.000.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**